## Krabbameinssjúk børn og foreldur teirra hittast

KRABBAMEIN
*tíðindaskriv*

15. februar er altjóða dagur fyri krabbameinssjúk børn, og eisini í Føroyum verður dagurin hildin. Bólkurin við foreldrum at krabbameinssjúkum børnum hevur opið hús frá klokkan 14.00 til 18.00 í hølunum hjá Krabbameinsfelagnum á Grønlandsvegi 58 í Havn. Og Foreldrabólkurin vónar, at nógv nýta høvið at støkka inn á gólvið henda dagin, sum er mikudagin í komandi viku, foreldur at børnum, sum eru sjúk, sum hava verið sjúk og eisini foreldur, sum hava mist barn av krabbameini. Hugaligt hevði eisini verið, um tey, sum hava havt krabbamein sum barn ella ung, leggja leiðina fram við felagshúsinum henda dagin.

Foreldrabólkurin, sum skjótt hevur fimm ár á baki, er ein virkin bólkur við eldsálum, ið duga at skapa hugna um síni børn. Hesa stuttu tíðina bólkurin hevur verið til, hava børnini saman við foreldrum og systkjum verið uttanlands og ferðast, og seinasta heyst á væleydnaðari ferð við Gjógv. Tey hava eisini skipað fyri minniligari konsert og øðrum tiltøkum, ið øll eru til frama fyri børnini.

Á hvørjum ári fáa 1-2 børn í Føroyum staðfest krabbamein og tí legst aftrat í bólkinum alla tíðina. Føroysk børn, ið fáa krabbamein, eru í serstøðu á tann hátt, at tey ikki kunnu fáa viðgerð og røkt fyri sína sjúku í heimlandinum, men mugu leita av landinum – ofta í sera drúgva tíð at fáa lekidóm og røkt. Tíbetur vísa hagtølini, at nógv tey flestu vinna á sjúkuni.

Øll eru hjartaliga vælkomin at støkka inn á gólvið í hølunum hjá Krabbameinsfelagnum altjóða dagin fyri krabbameinssjúk børn.

# Tutl fløgur hitta í USA

**Ein pakki av Tutl fløgum til eina amerikanska útvarpsstøð, hevur vakt mikla gleði millum starvsfólki, ið nú spælir nógvan føroyskan tónleik fyri amerikansku lurtarunum**

TÓNLEIKUR

Á útvarpsstøðini WMPG í Portland, Maine USA er føroyskur tónleikur dominerandi á playlistanum. Á listanum yvir mest spældu jass og fólkatónleika løgini eru ikki færri enn seks Tutl fløgur millum tíggju tær mest spældu. WMPG sendir til alt Maine, men hevur suður Maine sum málbólk. Í Maine búgva umleið 1,2 milliónir fólk, so hetta er ein rættiliga stórur marknaður. Men sambært støðini hoyrist hon um størsta partin av USA, tó er ógreitt um hvussu nógv lurtað uftan fyri Maine.

Kristian Blak dagligur leiðari av Tutl fekk beint fyri jól eitt teldubræv frá Bob Cochran, ið er leiðari fyri jasspartin av útvarpsstøðini. Cochran hevði hoyrt sjálvnevndu fløguna hjá Eivør Pállsdóttir og var so bergtikin av henni, at hann hevði ynskt, at hann hevði hoyrt hetta útrúliga tónlistarliga verk fyrr. Á heimasíðuni hjá Eivør, hevði Cochran funnið heimasíðuna hjá Tutl og sá stóra úrvali av jassi. Tí spurdi hann Kristian, um hann kundi sent honum eintøk av føroyskum jassfløgum. Kristian so gjørdi.

Síðan útvarpsstøðin fekk føroysku fløgurnar er føroyski parturin av sendiskránni hjá útvarpsstøðini vorðin alt størri. Men hesa vikuna ber av, við Eivør á øðrum plássi, og nøvnum sum Lossingarmenn, Yggdrasil, Tjant, Kristian Blak og Faroeesti á listanum.

Í vikuni fekk Kristian aftur mail frá Cochran, ið greiddi frá, at bæði hann og hini starvsfólkini á útvarpsstøðini vóru sera glað fyri tónleikin á Tutl fløgunum.


*Kristian Blak setur enn einaferð Føroyar á heimskortið*

**Mest spældu jassfløgur hesa vikuna á WMPG**

| | |
|---|---|
| 1. | Chick Corea – The Ultimate |
| 2. | Eivør Pállsdóttir – Eivør Pállsdóttir |
| 3. | Lossingarmenn – Lossingarmenn |
| 4. | Larry Goldings – Quartet |
| 5. | Yggdrasil – Yggdrasil |
| 6. | Deanna Witkows – Length of Days |
| 7. | Tjant – Tjant |
| 8. | Kristian Blak - Addeq |
| 9. | Faroeesti – Faroeesti |
| 10. | Thomas R. Einarsson – Let Jazz Be Bestowed OnThe Huts |

# James Blunt heldur støðið

**Enn eina viku liggur James Blunt ovast á 15 teimum bestu. Hjá føroysku tónleikabólkunum gongur eitt sindur misjavnt**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

James Blunt heldur fast í ovastu rók á fimtan teimum bestu. Hóast Høgni Lisberg vann planetina fyri bestu fløgu, meðan Blunt, ið var í uppskoti til planetina fyri besta útlendska navn, ikki megnaði at vinna, so er Blunt við yvirlutan á 15 teimum bestu. Aftur hesa vikuna liggur lagið "Goodbye my lover" á ovastu rók.

Høgni í snoddaði eftir fyrsta plássi í seinastu viku, er dottin eitt pláss til triðja pláss, meðan nýggja lagið á øðrum plássi er Advertising Space hjá Robbie Williams. Høgni eigur einasta føroyska lagið í top fimm, Kelly Clarkson og Black Eyed Peas liggja ávíkavist á fjórða og fimta plássi.

Føroyskt danski bólkurin Amazon Air kom beinleiðis inn á níggjunda pláss á 15 teimum bestu hesa vikuna. Lagið "Beacause Tonight" er fallið væl í smakkin hjá føroysku útvarpslurtarunum.

Hin føroyskt danski bólkurin á listanum Fuzzphase er dottin enn eitt pláss hesa vikuna. Bólkurin og kom brakandi inn á fimta pláss fyri tveimum vikum síðan, men datt beint niður á ellinta pláss í síðstu sending.

Annars gongur eitt sindur misjavnt hjá føroysku bólkunum á listanum. Poppkorn og "Droymi mitt um dagin" er kropið trý pláss uppeftir listanum á sjeynda pláss. Meðan "Grannin" hjá Páll Finnur Páll er farin heili sjey pláss aftur á trettanda pláss. Petur Pólsson og vinmenn syngja aftur hesa vikuna um Timburmenn á fjúrtanda plássi.

Aftur hesa vikuna er eitt føroyskt lag ímillum eykaløgini, talan er um 17 ára gamla hip hopparan Thor Simonsen og heitislagið av fløguni Back it up.


*James Blunt*

## Amazonair vil til Føroyar at spæla

Danski bólkurin við føroyska gittarleikaranum Pæturi Sivertsen kom leygardagin inn á 9. pláss á 15 teimum bestu, hetta fegnast tónleikararnir um og arbeiða nú við at sleppa til Føroyar at framføra, hetta skrivar bólkurin á heimasíðu síni.

Teir eru sera glaðir fyri, at teirra tónleikur nú er at hoyra í føroyskum útvarpi, og geva enntá fjepparum sínum vegleiðing í hvussu tey kunnu atkvøða á 15 teimum bestu. Meðan føroyingar í spenningi kunnu bíða eftir, at Amazonair kemur til Føroyar, kunnu útisetar í Keypmannahavn uppliva bólkin í Krudttønden á Eystaru brúgv.

**nud**

## Eivør og Messell í Aalborg

Tá Aalborg Folk & Songwriter Festival 06 fer av bakkastokki 15. – 18. februar verður tað við luttøku av tveimum føroyskum einstaklingum. Festivalurin verður partur av Danmarks ferðini hjá Eivør, men eisini útisetin Messell fer at spæla.

Eivør fer nú hósdagin undir sína Danmarksferð, luttøkan í Aalborg verður fríggjakvøldið 17. februar á Skraaen. Fyrrverandi Maður: Glotti mðaruin, Messel spælir hóskvøldið 16. februar somuleiðis á Skraaen



**nud.**